# Føroyingar á veg til Turkalands

Í gjár oru føroysku landsliðsspælararnir Atli Danielsen og Jón Rói Jacobsen saman við liðfeløgunum í Frem til Turkalands. Har skulu teir næstu vikuna fyrireika seg til seinnapartin av landskappingini í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Fyrsti dysturin verður annan sunnudag á útivølli í Nykøbing Falster. Frem var á venjingarlegu í Turkalandi í fjør, og tá vóru Atli og teir sera væl nøgdir við, at tað bar til at venja á góðum grasvallum.



# Mourinho vil venja United

Portugisiski venjarin Jose Mourinho, sum venur Inter, heldur tað vera sjálvsagt, at hann gerst venjari hjá Manchester United, tá Alex Ferguson leggur frá sær. – Tá Ferguson fer frá, fer United at leita eftir teimum bestu venjarunum í heiminum. Eg felli inn í ta kategoriina, sigur Mourinho við enskar fjølmiðlar. Mourinho er ikki í iva um, at hann er væl egnaður til venjarastarvið.

Neistin-Kyndil 29-22 (15-11)

# Eingin ivi á Hálsi

**Neistin greiddi sína skyldu móti grannunum úr Kyndli, og skal nú fyrireika seg til finaluna um finaluplássið**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Jónleif Sólsker hjá Kyndli er sloppin fram við Tróndi Kragesteen hjá Neistanum, men tá avtornaði vóru Tróndur og teir frammanfyri*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Floytan hevur ljóðað fyri seinastu ferð. Tvey stig afturat eru komin í hús. Enn ein arbeiðsdagur á vøllinum er lagdur afturum. Og nøsirnar venda móti skiftingarrúminum eru allir vitandi um, at avgerðin fellur ikki fyrr enn um tríggjar vikur.

Neistin greiddi í gjár sína skyldu í grannauppgerðini móti Kyndli. Leiðslan hjá bláa høvuðsstaðarfelagið var – burtursæð frá einu løtu í seinna hálvleiki – ongantíð hótt, og sigurin var fult uppiborin. Men tað hevði ikki stórvegis týdning í morgun. Nú bíða neistafólk eftir avgerandi dystinum um finaluplássið, sum verður leiktur 29. mars.

### Eingin ivi

Neistin var við yvirlutan í stórum løtum av dystinum í gjár. Grannarnir úr Kyndli royndu at taka ferðina úr dystinum, men neistamenn lótu seg ikki ávirka. Við skjótum og hugflogsríkum álopsspæli hevði verjan hjá grannunum ofta bestan hugin bara at hyggja at.

Fyri viku síðani gjørdi Torvald Abrahamsen úr Kyndli greitt, at teir skuldu í øllum førum syrgja fyri, at Neistin ikki sleppur í finaluna. Spenningurin undan dystinum var eisini, um Kyndil kundi leggja fót fyri grannunum. Men tað sást tíðliga, at tað fóru teir ikki.

### Royndu at hótta

Kyndil royndi at hótta leiðsluna eftir steðgin, og einu løtuna vóru teir heilt nær við. Men í løtum tóktist tað, sum teir einans høvdu dómaraavrikið í huganum. Við fýra minuttum eftir at spæla, var Neistin á odda við trimum málum, 25-22. Og tá Kyndil misnýtti upplagdan møguleika at koma enn nærri, slapp bláa helvtin av høvuðsstaðnum avstað.

Hans Áki Dal-Christiansen var hesa ferð undangongumaður hjá Kyndli. Hann stóð í alt fyri 11 av málunum hjá teimum grønu.

Neistin vann tá avtornaði 29-22, og hóast sjálvt spælið ongantíð var í hásæti, var breiddin hjá steypavinnarunum teimum til greiðan fyrimun.

### Nú skal alt avgerast

Neistin kann nú gera klárt til finaluna undan finaluni. andi dystur millum teir bláu og H71, har vinnarin helst vinnur sær sæti í finaluni.

Neistin, sum hevur havt takið á hoyvíkingum í ár, bíðar framvegis eftir endaligu avgerðini um dystin móti VÍF. Vinnur bláa høvuðsstaðarfelagið ikki tey stigini, hava teir brádliga ryggin móti múrinum.

Men føroyameistararnir eru í øllum førum til reiðar at varðveita føroyameistaraheitið!

## FAKTA um dystin

**Neistin-Kyndil 29-22 (15-11)**
**10 min:** 4-4
**20 min:** 11-8
**30 min:** 15-11
**40 min:** 21-15
**50 min:** 23-20
**Málskjúttar**
**Neistin:** Jugoslav Djumic 8, Karl Herup Olsen 5, Birgir Poulsen 5, David Edvardsen 3, Tróndur Kragesteen 3, Blagoje Buha 2, Finnur Hansson 2, Karl Odmar Rasmussen 1
**Kyndil:** Hans Áki Dal-Christiansen 11, Jónleif Sólsker 3, Janus Einar Sørensen 3, Bárður Johannesen 2, Hans Arni Thomsen 2, Torvald Abrahamsen 1
**Brotskøst:** Neistin 2, Kyndil 8
**Útvísingar:** Neistin 2, Kyndil 4
**Dómarar:** Kristian Johansen & Heri Petersen

# Vit eru klárir

Tróndur Kragesteen staðfestir, at sigurin móti Kyndil var uppiborin.

– Vit hava tamarhald á dystinum so at siga allatíðina. Kyndil hóttir leiðsluna hjá okkum miðskeiðis í seinna hálvleiki, men sæð burtur frá tí, so er eingin ivi.

Hvussu avgerandi verður komandi dysturin móti H71 tann 29. mars?

– Hann verður altavgerandi, tí vinnarin eigur plássið í finaluni. Vit hava havt takið á H71 fyrr í hesum kappingarárinum, og tað er neyðugt, at vit hava tað í huganum. Vit eru klárir.

Nú verður steðgur í landskappingini. Sært tú tað sum ein fyrimun ella ein vansa?

– Vit hava ikki havt fyrimun av tí áður. Men eg dugi ikki veruliga at meta, um tað er ein fyrimunur ella ikki. Tað fáa vit at síggja, sigur Tróndur Kragesteen úr Neistanum.

**uni**

# Ússaligt dómaraavrik

Bárður Johannesen úr Kyndli gjørdi í Kringvarpinum í gjárkvøldið greitt, at hann ikki var nøgdur við dómaraavrikið.

– Neistin hevði uppiborið sigurin, og vit taptu ikki orsakað av dómarunum. Men tað er ikki til at skilja, at annar av dómarunum letur seg so lætt ávirka. Tað var einvegis døming, men tað var kortini ikki munurin í dag, staðfesti Bárður Johannesen í Kringvarpinum.

Bárður Johannesen stóð fyri tveimum av málunum hjá Kyndli í gjár.

**uni**

StÍF-VÍF 26-39 (11-21)

# VÍF er í finaluni

**Hóast tað leingi hevur verið rættiliga sannlíkt, var tað ikki fyrrenn í gjár, at vestmenningar tryggjaðu sær pláss í finaluni**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

VÍF hevur sitið trygt á fyrsta plássinum seinastu mánaðirnar, og tað hevur helst eingin ivi verið um, at vestmenningar fóru at eiga pláss í finaluni. Tað var endaliga staðfest í gjár, tá VÍF vann trygt á útivølli móti StÍF.

StÍF hevur verið í somu støðu sum kollfirðingar og Kyndil seinastu vikurnar. Teirra leiklutur hevur verið at stolið stig frá ovaru liðunum, og hesum høvdu strandingar møguleika fyri aftur í gjár. Men tað varð ongantíð nær við. VÍF vann við 13 málum – 39-26.

Bæði liðini nýttu høvið at royna yngri leikarar, og fleiri teirra stóð seg eisini væl. Vestmenningar vóru greitt við yvirlutan alla tíðina, og longu í steðginum vóru teir á odda við 10 málum.

VÍF er til reiðar til finaluna, og bíðar nú bara eftir, um mótstøðuliðið verður H71 ella Neistin.

**StÍF-VÍF 26-39 (11-21)**
**StÍF:** Jógvan Berg 5, Jørmund Joensen 4, Jóanes Prestá 4, Bent Djurhuus 3, Mortan Hansen 3, Hávardur Trúgvason 3, Rúni Niclasen 2, André Danielsen 1, Borgar Danielsen 1
**VÍF:** Bjarti Hansen 10, Rúni Joensen 9, Niels Andreasen 5, Karl J. Djurhuus 3, Agnar Joensen 3, Áki G. Olsen 3, Joen P. Høgnesen 2, Sámal Joensen 2